# Fortreytir fyri at seta upp lofteftirlitsradara í Føroyum

*Á fundi í Tórshavn tann 9. juni 2022 eru landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana, og Morten Bødskov, verjumáláráðharri Danmarkar, vorðnir samdir um fortreytirnar fyri at seta upp lofteftirlitsradara í Føroyum.*

## Endamál

Sum part av arktiska kapasitetspakkanum hevur  Danmark ynski um at seta upp lofteftirlitsradara í Føroyum. Arktiski kapasitetspakkin inniheldur ætlanir og átøk, ið skulu styrkja um evnini at fylgja og hava eftirlit við virksemi í Arktis og Norðuratlantshavi. Millum annað við langtberandi dronum, ið eisini kunnu nýtast í sambandi við leiting og bjarging á sjónum. Lofteftirlitsradari hjá donsku verjuni hevur áður staðið í Føroyum, og nú trygdarpolitiska støðan er í broyting, verður mett, at tørvur er á nýggjum radara til tess at gera eftirlitið í sonevnda GIUK-gapinum betri.

Avgerðin at seta upp nýggjan lofteftirlitsradara í Føroyum verður tikin eftir, at landsstýrið hevur ráðført seg við Løgtingsins uttanlandsnevnd, umframt samráðingar millum Uttanríkis- og mentamálaráðið og Verjumálaráðið. Avgerðin at geva tilsøgn til nýggjan radara vísir føroyska viljan at gera sítt til og at samstarva um trygdar- og verjupolitisk viðurskifti í økisbundnum og í millumtjóða høpi.

Umframt nógva samskiftið millum verjumálaráðið og uttanríkistænastuna hava partarnir samskift við NATO, USA, Bretland, Noreg, Kanada og Ísland um tørvin á eftirliti í loftrúminum yvir føroyskum øki.

## Samstarv

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum og danski verjumáláráðharrin eru við hesum samd um, at ein lofteftirlitsradari verður fingin til vega og settur upp í Føroyum. Fyrireikingarnar og uppsetingin verða umrøddar á regluligum embætisfundum, har serfrøðingar eru við eftir tørvi. Við støði í hesum fundum skulu frágreiðingar um gongdina í málinum leggjast fyri politiska myndugleikan.

Hava føroyskir myndugleikar ávís krøv í tilgongdini at fyrireika, fáa til vega, seta upp og reka radaran, verður lagt upp fyri tí.

Føroyskar fyritøkur hava á jøvnum føti við aðrar fyritøkur møguleika at bjóða upp á uppgávur í sambandi við, at radarin verður settur upp, t.d. projektering, ráðgeving, innkeyp, konstruktión, bygningar, tøkniligar innleggingar og rakstur. Áhugaðar fyritøkur kunnu søkja um trygdargóðkenningar framman undan einum útboði.

## Umhvørvisviðurskifti og nýtsla

Lofteftirlitsradarin verður væntandi settur upp á Sornfelli, har hin radarin stóð. Tí ber til at nýta ein part at tí undirstøðukervi, sum longu er gjørt. Farið verður undir samráðingar um treytirnar at nýta Sornfelli til endamálið, eisini fíggjarligu viðurskiftini og spurningin um ta ávirkan, tað kann hava á leigumál, ið er.

Verður økið trygdaravmerkt, verður fyrivarni tikið fyri, at fólk ganga í fjøllunum, at seyður gongur har, og at tørvur kann verða hjá føroyskum myndugleikum at hava standandi ella at seta

aðra útgerð upp á Sornfelli. Myndugleikakrøvini verða fylgd, tá ið nýggi radarin verður settur upp.

Til gagns fyri sivilu flogtrygdina, verða allar dátur frá lofteftirlitsradaranum latnar Vága floghavn, Vørn og øðrum møguligum føroyskum myndugleikum í samsvari við galdandi reglur um trúnaðarflokking. Um neyðugt standa føroyskir myndugleikar fyri at útvega møguligar skipanir, ið kunnu taka ímóti og vísa dáturnar. Tryggjað verður, at viðkomandi starvsfólk í Føroyum verða lærd at viðgera dátur frá lofteftirlitsradaranum.

**Tilgongd**

Verkætlanin byrjar í 2023 og heldur væntandi fram í nøkur ár. Tilgongdin fevnir millum annað um, at verkætlanin verður fyrireikað, boðin út, at sáttmálar verða gjørdir, at bygt verður, og skipanir verða lagdar inn.

Fyri Føroya landsstýri

Jenis av Rana
landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Fyri stjórn Danmarkar

Morten Bødskov
verjumálaráðharri